# Hálvt marathon í Havn

Hóskvøldið verður kappast á 21,1 km drúgva teininum í Havn
Tað er Bragdið, sum skipar fyri kappingini, ið byrjar klokkan 18, og sum endar á Bursatanga.
Umframt, at renningin leygardagin er ein FM-kapping, er hetta eisini ein opin kapping, t.v.s. at øll, sum halda seg til, eru vælkomin at luttaka.
Í ár verður aftur kappast í fleiri bólkum, kvinnur og menn (f. 1961-1989) og veteranar kvinnur og menn, tað eru tey sum eru 45 ár ella eldri (f. -1960).
Tilmelding fer fram á heimasíðuni www.athletics.fo í seinasta lagi mikukvøldið 10. mai.
-mørk

Formuladeildin

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 10.05 | ÍF-B68 | Dagfinn Olsen |
| 10.05 | B36-GÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 10.05 | NSÍ-Skála | Georg Rasmussen |
| 10.05 | EB/Str.-KÍ | Eiler Rasmussen |
| 11.05 | HB-VB/S | Petur Reinert |

Steypakapping kvinnur

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 5.05 | KÍ-GÍ | LÌF |
| 10.05 | AB-B36 | Fram |

# Evropeisk ítróttaráðstevna til Føroya

**Á aðalfundinum hjá evropeiska felagsskapinum fyri ítróttasambond, ENGSO, um vikuskiftið varð avgerð tikin um, at árliga ráðstevnan hjá felagsskapinum skal vera í Føroyum á heysti 2007**

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Hetta er fyrstu ferð, at ein slík evropeisk ráðstevna verður hildin her heima. ÍSF hevur seinnu árini miðvíst arbeitt við at gera vart við Føroyar í hesum felagsskapi, ið fevnir um ítróttasambond og olympiskar nevndir úr øllum Evropa.

Hetta hevur m.a. havt við sær, at Føroyar luttóku í einum pall-borði um ítrótt í oyggjasamfeløgum á ráðstevnuni seinasta heyst, at Ítróttasamband Føroya luttekur í einum fylgibólki hjá menningarbólkinum hjá felagsskapinum, og at nevndin hjá felagsskapinum kemur til Føroya at hava nevndarfund í september 2006.

Nú er so greitt, at limalondini hava viðgjørt føroyska tilboðið um at skipa fyri ráðstevnuni í 2007 við vælvild.

**Einmælt samtykt**

Formaðurin, Bengt Sevelius, legði uppskotið at leggja ráðstevnuna í Føroyum í 2007 fyri aðalfundin leygardagin. Limalondini stuðlaðu einmælt tilmælinum hjá nevndini.

Sum meginfelagsskapur fyri ítróttasambond í Evropa arbeiðir ENGSO (European Non Governmental Sports Organisation) m.a. sum lobbyfelagsskapur fyri ítrótt mótvegis nationalum og evropeiskum politiskum myndug-leikum. Samstundis miðjar felagsskapurin eftir at menna førleikan hjá limafelagsskapunum. Triðji tátturin er at skapa karmar fyri einum opnum kjaki um yvirskipað ítróttaviðurskifti í Evropa.

Ítróttasamband Føroya hevur verið limur í ENGSO síðani 1976

Ítróttasamband Føroya ásannar stóra týdningin av, at Føroyar átaka sær ein virknan leiklut í altjóða ítróttafelagsskapum bæði fyri at fáa ávirkan og fyri at styrkja um altjóða profilin hjá Føroyum. Ítróttasamband Føroya vónar, at sersambondini fara at taka hendan tráðin upp og í øktan mun fara at taka á seg ábyrgd í altjóða ítróttasamstarvi.

# Clapson er einasta ivamálið

**Bæði á Mølini og í Klaksvík er stór kapping um plássini millum teir fyrstu ellivu á liðum, ið hava undanvind**

EB/STREYMUR-KÍ
*Jóannes Hansen*

*Tað verður rættiligur toppdystur á Mølini mikukvøldið, tá ið EB/Streymur og KÍ bresta saman. Álopsessið hjá KÍ, Paul Clapson, stríðist við ein snudd í knænum, men hann spældi og skoraði ímóti HB seinast*

Í annaðkvøld skulu klaksvíkingar aftur royna seg á útivølli. Higartil hava teir vunnið tvær ferðir í Eysturoy – í Runavík og í Fuglafirði.

Uppgávan og avbjóðingin tykist rættuliga stór, og tað kann væl vera, at KÍ og iva-leyst mongu stuðlarnir, sum fara fyrsta betalingstúrin gjøgnum undirsjóvartunnilin í annaðkvøld, vera nøgd, um KÍ eisini eftir ferðina til Eiðis verður ósigrað.

EB/Streymur spruttar av sjálvsáliti. Eftir avsmurningin í Runavík í fimta umfari eru teir orduliga komnir fyri seg aftur. Tað boða sigur á heimavølli móti Skála og javnleikur í Gundadali móti FM vinnarunum í B36 boð um.

Á Eiði er alt fólkið tókt uttan vongverjin Ólavur Poulsen, sum nú í nakrar vikur hevur gingið við brotnum armi. Stór kapping er um fyrstu ellivu plássini. Eisini í málinum, har Gunnar á Steig støðugt pressar René Tórgarð, sum higartil hevur verið rættuliga sannførandi.

**Ivi um álopsessið**

Í Klaksvík kendist tað sunnudagin eftir 2. hálvleik meiri sum KÍ hevði vunnið eitt stig heldur enn, at teir høvdu tapt tvey stig. Klaksvíkingar eru framvegis ósigraðir. Um teir eisini skulu verða tað í kvøld, so skulu teir vísa betri avrik, enn teir vístu sunnudagin.

Útjavnandi málið móti HB skoraði Paul Clapson, sum er toppskjútti. Hann spældi við stórari binding um knæið. Tað var týðuligt, at alt var ikki, sum tað skuldi vera hjá honum, men kortini var tað Paul Clapson, sum syrgdi fyri, at KÍ fekk eitt stig. Tí er einki at ivast í, at Tony Paris ógvuliga fegin vil hava álopsessið á vøllin í kvøld.

Seinnu árini hevur EB/Streymur havt heilt gott tak á KÍ. Men hjá klaksvíkingum er so nógv øðrvísi nú, enn tað hevur verið fleiri tey seinastu árini.

# B68 skal hava nýggjan málverja

**Bæði í Fuglafirði og á Toftum mugu teir vera meiri ansnir síðsta hálva tíman, enn teir vóru sunnudagin**

ÍF-B68
*Jóannes Hansen*

Tað er sannur botngysari á skránni í Fuglafirði í annaðkvøld. ÍF er stigaleyst, og um tað ikki eydnast at fáa stig á heimavølli móti teimum næstaftastu, so fer at síggja svartari enn svart út.

Í Runavík gekk lutfalsliga væl fyrsta tíman. So skrædnaði, og nógv av NSÍ málunum í 6-1 sigrinum stóðust av persónligum mistøkum. Tað tykist sum um, at sinniliga yvirskotið ikki er nóg stórt, og tað drenar sjálvsálitið burtur.

Bartal Eliasen er tøkur aftur eftir leikbann, og Dánial Pauli Højgaard er komin fyri seg eftir skaða. Tað gongur eisini betri hjá Arnholdi Joensen, men tað er ivasamt, um hann verður við í annaðkvøld.

Á Toftum hevur úrtøkan verið lítil seinastu umførini. 3-2 tapið í Vági var stórt vónbrot. Tað ber við sær, at B68 nú er á niðurflytingarplássi, og tað mundi kennast sera meint at tapa, eftir at B68 hevði verið á odda við tveimum málum.

Alex Troleis er tøkur aftur eftir leikbann. Stóri spurningurin er, hvør skal verja málið. Tórður Thomsen varð vístur av vøllinum í Vági. Fróði Jensen, sum hevur verið næsti málverjin, er skaddur. Hinir møguleikarnir eru Mass Nesá, sum kom í málið í Vági, og Mortan Hansen, sum sunnudagin vardi málið á næstbesta liðnum.

ÍF spældi á Svangaskarði í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. Tá endaði tað við javnleiki, og B68 vann brotssparkskappingina.

formuladeildin

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 13 | 8 | 5 | 16 |
| 2 | KÍ | 7 | 4 | - | 3 | - | 0 | 16 | 7 | 9 | 15 |
| 3 | GÍ | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 14 | 8 | 6 | 14 |
| 4 | B36 | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 11 | 8 | 3 | 14 |
| 5 | HB | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 18 | 10 | 8 | 11 |
| 6 | NSÍ | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 11 |
| 7 | VB/S | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 8 | 21 | -13 | 6 |
| 8 | Skála | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 9 | 9 | 0 | 5 |
| 9 | B68 | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 7 | 13 | -6 | 5 |
| 10 | ÍF | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 7 | 24 | -17 | 0 |